

Tónleikur

# Týr rendir á »Land«

**Føroyski Heavyrokkbólkurin Týr gevur í næstum nýggja fløgu út á Napalm Records, og kallast hendan »Land«. Hetta verður fjórða útgávan frá víkingunum, ið flestu føroyingar kenna best fyri sína útseting av »Ormurin Langi«. Men nógv er hent síðani »Ormurin Langi« fekk uppreisn her á klettunum**



*Eg má siga, at eg haldi »Land« vera rættiliga langdrigna og monotona. Her hendir so nógv allatíð, men tó so lítið. Eg sakni, at tónleikurin sleppur at anda, at trummurnar halda munn eina løtu, at gittararnir halda aftur eina løtu, at okkurt brýtur frá hesum ævigu harmoniunum av dómi og kríggi, sigur ummælarin Líggjas Olsen um nýggju fløguna hjá Týr*

★★☆☆☆☆

FLØGU UMMÆLI
*Líggjas Olsen*

Bólkurin hevur m.a fingið plátusáttmála og hevur nógv at gera í øðrum londum, har hann veruliga hevur fingið vind í seglini. Menninir í Týr eru júst afturkomnir úr USA, har teir hava spælt á PAGANFEST, ið er ein festivalur við líknandi bólkum sum Týr á skránni.

Líggjas Olsen gevur her sína meting av nýggju fløguni hjá Týr, ið verður útgivin í morgin, 30. mai.

**At elska ella hata**

So vóru teir aftur her við sínum víkingahalløji. Heavyrokkararnir Týr, sum altíð fyri mær hava virkað sum nakrir kiksaðir, wannabe krígsmenn við brynjum og ketum og hvat veit eg av tilhoyri. Og nú skal eg so ummæla teirra nýggju fløgu, sum eg eri bangin fyri ikki er stórvegis øðrvísi enn alt hitt, teir hava gjørt av tungum víkingarokki. Men hví skuldi tað nú verið tað? Tí eg vil tað? Neyvan.

Týr er ein bólkur, sum beinanvegin gjørdi greitt, at teir neyvan fóru at gera øll nøgd. Dámdi tær teirra tónleik, so elskaði tú hann. Um ikki, so hataði tú hann kanska. Eg hoyri til tann seinna bólkin, tíverri. Havi ongantíð orkað fyri hesum øgiliga stíva, ágangandi slagnum av rokktónleiki, sum verður spældur uttan nakran steðg, uttan fintfølandi elementir, ja næstan uttan dynamikk. Beint til sakina, allatíð! Tað verður knallað til frá byrjan til endan, og hetta skal so nokk avspegla kríggj og slátur og uppíblandan frá norrønum gudum. Lesarin er tó vælkomin at kanna nærri sjálvur. Hetta er so tað, sum eg havi fingið burturúr, tá eg havi hoyrt tónleikin hjá Týr, og sjálvt um eg havi roynt at skilt og sett meg inní osfr, so suffi eg bara og vil helst sløkkja og njóta friðin heldur enn kríggið, sum Týr so lívliga siga frá. Orsaka dreingir, tað er sikkurt eg, ikki tit.



*Fløgan »Land« hjá Týr kemur út á fløguhillarnar í morgin, 30. mai*

**»Land«**

Aftaná eina gjøgnumlurting av »Land« (sum síðan varð lurtað einar 4 ferðir ígjøgnum), komi eg fram til, at hettar er Týr, júst sum eg kenni teir. Ljóðið er tungmálsligt, men alíkavæl nokso reint. Haldi ikki, tað kann sigast, at ljóðið er serliga modernað, og í hesari sjangruni hevur tú ikki endiliga eitt modernað ljóð. Tað er eitt lítið sindur tunt, soleiðis sum fleiri av metal fløgunum fyrst í 90'unum ljóðaðu, og sum ikki er broytt stórvegis síðani. Røddin hjá Hera er góð og liggur væl inni í ljóðmyndini, og hann ljóðar til tíðir sum ein rættur víkingur á veg í kríggj. Illur, dramatiskur og mannligur.

»Land« byrjar við, at Hanus G. Johansen sigur frá Gandkvæði Tróndar, sum J.H.O Djurhuus yrkti. Afturat sær hevur hann eín bólk av strúkarum og eitt sindur av kvæðastemningi aftanfyri. Hetta haldi eg riggar væl í sær sjálvum, men ikki endiliga saman við restini av fløguni. Hanus er meistari í at siga frá við síni djúpu, dramatisku rødd, sum passar perfekt til hetta Gandkvæði Tróndar.

**Eins tempo og dynamikkur**

Aftaná góðar tveir og ein hálvan minutt kemur so bólkurin stundandi inn, og so er krígsstemningurin settur. Fløgan koyrir so í væl yvir ein tíma, og tempo og dynamikkur broytist stórt sæð ikki, ella sera lítið, og hetta haldi eg vera ein av fleiri veikleikum. Tónleikurin er riff-kendur og bygdur omaná melodiir, ið fyri tað mesta eru traditionellar føroyskar ella skandinaviskar vísur og kvæði. Fresandi gittarsolo'ir av Terja Skibenæs sleppa eisini at sníkja seg upp í part, og tað vita vit øll, at hann dugir til UG.

Teksturin skiftir millum føroyskt og enskt, meðan eitt lag, »Sinklars Vísa«, er á norskum. Dugi ikki at síggja eitt gjøgnumgangandi tema ella eina kontinuerliga søgu gjøgnum fløguna, burtursæð frá, at tekstirnir allir snúgva seg um lívið og tess innihald tá einaferð aftur í víkingatíðini. Hetta kann sostatt ikki sigast at vera ein konseptfløga, sum t.d »Ragnarok« var. Hendan er episk og alt hattar har, men løgini eru ikki bundin av hvørjum øðrum á nakran hátt.

**Nógv, men lítið**

Eg má siga, at eg haldi »Land« vera rættiliga langdrigna og eisini monotona. Her hendir so nógv allatíð, men tó so lítið. Eg sakni, at tónleikurin sleppur at anda, at trummurnar halda munn eina løtu, at gittararnir halda aftur eina løtu, at okkurt, bara okkurt brýtur frá hesum ævigu harmoniunum av dómi og kríggi. Tí tað er júst tað, hendan fløgan er. Hon byrjar, og hon endar ikki, fyrr enn ein lítið broytt endurinnspæling av »Hail To The Hammer (How Far To Asgaard)« slær tað fast. Og tá hevur tú staðið í einari ódn í meira enn ein tíma, uttan at hava flutt teg serliga nógv.

Júst hví hendan endurinnspælingin av »Hail To The Hammer« er komin við á »Land«, veit eg ikki. Kann vera, at teir hildu seg mangla eitt »hitt«, tí eisini tað er sera ringt at hoyra her, kanska líka burtursæð frá skering tvey, »Sinklars Vísa«, sum hevur eitt nokso fangandi niðurlag.

So nei, eg haldi bestemt ikki, at Týr við »Land« hava sligið seymin á høvdið. Okkurt meira má til fyri at sannføra meg. Kanska toran slær niður á meg og ger júst tað.

Tað skuldi eisini undrað meg, um »Land« fær stórvegis rós á metal orienteraðu tónleikamiðlunum, men hvør veit. Tað kann vera, eg havi mist okkurt.

2 útav 6 stjørnum herfrá, og tá skal man minnast til, at eg hoyri til tann bólkin, sum bara ikki ordiliga skilir Týr.

Fløgan er sett at koma út í morgin, fríggjadagin 30. mai, og møguleiki er eisini at ogna sær eina dupultfløgu, harav tann eina er ein konsert DVD frá Wacken 2007.